## Mentamálaráðið

# Tíðaravmarkað starv sum fyrstilærari í Hósvíkar Skúla

Vegna farloyvi verður starvið sum fyrstilærari í Hósvíkar Skúla lýst leyst til setanar í tíðarskeiðnum 1. august 2009 – 31. juli 2010.

Í Hósvíkar skúla verða 38 næmingar í 7 árgangum. 4 lærarar starvast í skúlanum.

**Søkt verður eftir fyrstalærara, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar
- í samstarvi við foreldrini skal virka fyri, at næmingarnir fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt

**Harumframt skal lærarin**
- vera førur fyri at útinna eina mennandi starvsfólkaleiðslu og at tryggja, at lærarar skúlans hava umstøður fyri fakligari menning
- skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri samábyrgd og ávirkan
- leggja dent á at menna skúlaskapin í kommununi

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum. Harumframt er tað ein fyrimunur, um umsøkjarar hava leiðsluroyndir.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við fyribils tænastu í Hósvíkar skúla. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum.

Starvið er flokkað í lønarflokkunum 31.2 og 31.3 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við avriti av læraraprógvi, skeiðum, frágreiðing um arbeiðsroyndir og møguligum viðmælum skulu verða Mentamálaráðnum í hendi **í seinasta lagi 3. juni 2009.**

**Umsóknin verður stílað til:**
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 306500.

Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Haraftrat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum og øðrum frítíðarvirksemi.

**Mentamálaráðið**
Postrúm 3279 · 110 Tórshavn · Telefon 35 50 50
Telefax 35 50 55 · e-postur.: mmr@mmr.fo

Sosialurin
www.sosialurin.fo

ADVOKATSKRIVSTOVAN

## Tvingsilssøla

**Týsdagin tann 23. juni 2009, kl. 09.45,** verður á Dómaraskrivstovuni í rættarsali IV, undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 1412 d, Tórshavn.**

Talan er um grundøkið til støddar 501 m² við ástandandi sethúsum í stovu- og loftshædd. Húsini eru innrættað soleiðis:

**Veghædd:**
Gangur, wc v/brúsu, goymslurúmi undir trappu. Køkur/stova, dagligstova.

Gólv í gangi, baðirúmi og fýrrúmi eru løgd við flísum. Í hinum rúminum eru gólvini úr furu.

**Loft:**
Úti á lofti: tvey kømur, kamar á kvisti, hjúnarúm, baðirúm við baðikari og brúsu, flísar á gólvi og lítið goymslurúm.

Gólvini eru úr furu.

Ognin liggur í friðarligum umhvørvi í Gundadali.

Nærri upplýsningar um ognina fáast við at venda sær til Fríðu Patusson, advokatur, Frúutrøð 4, Tórshavn, tel. 353335 frp@jura.fo (j. nr.20080818) ella skrivaran Anniku Reginsdóttir Olsen aro@jura.fo.

**Føroya Fútarættur, tann 11/3-2009**

Frúutrøð 4 · Postboks 6
FO-110 Tórshavn
Tel 35 33 35 · Fax: 35 33 36
www.jura.fo

## Tvingsilssøla

**Týsdagin tann 23. juni 2009, kl. 14:00** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn hildin nýggj tvingsilssøla yvir ognina matr.nr. 102a, Søldarfjørður (AS nr. 2-1/2009). Hægsta boðið á 1. tvingsilssøluni var kr. 5.000,00.

Matr.nr. 102a, Søldarfjørður, ið liggur Oman á Sand 15, er ein vinnubygningur og sambært tryggingarskjalinum fyri bygningin er bygda økið 564 m² í tveimum hæddum. Samlaða grundøkið er 2.294 m². Bygningurin hevur verið nýttur til HVS-innlegging, blikksmíð, smásølu av jarnvørum og framleiðslu.

Bygningurin er annars innrættaður soleiðis:

Miðhædd:
Trappugongd upp til miðhæddina. Á miðhæddini er eitt handilshøli, tríggjar skrivstovur, goymslurúm, køkur, musikrúm, vesi og køkur.

Bygningurin er stoyptur og partvís beklæddur. Vindeyguni eru plastikk og takið er av stáli.

Tvingsilssølan er umbiðin av Ingi Højgaard, adv., v/Mimi Steintórsdóttir, adv. ft., Advokatfelagið við Strond 4, Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 8800808), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur**

Lesið
Sosialin
-tað loysir seg



## Mötley Crüe konsert

**Tvey atgongumerkir til Mötley Crüe konsert í KB-Hallen 10. Juni eru til sølu fyri 495,- kr. pr stk.**

ÁHUGAÐI RINGIÐ Á 220022

## Hey allar tit, ið hava gingið til handarbeiði hjá Jessie Høgagarð í Tofta kvøldskúla.

Ætlanin er at gera eina minnisframsýning um Jessie Høgagarð tann 6. og 7. juni 2009.

Í hesum sambandi fara vit at biðja um at fáa tvey av teimum handarbeiðum, tit hava gjørt á kvøldskúla hjá Jessie í Tofta skúla - kanska eitt gamalt og eitt nýggjari.

Vit gleða okkum at gera hesa framsýning, men hon kann bert gerast áhugaverd og fjølbroytt við tykkara hjálp.

Handarbeiðið kann latast inn í Tofta skúla hósdagin 4. juni frá kl. 19 – 22 og fríggjadagin 5. juni frá kl. 9 – 12.

Meiri fæst at vita við at ringja til Mariu Rasmussen tlf.: 447833.

Framsýningin umfatar eisini ymiskt kvøldskúlaarbeiði veturin 2008/2009 og næmingaarbeiði hjá 3. – 7. flokki í Tofta skúla.

**Tofta Kvøldskúli**
TELEFON 447332

## Bygningur á Hjalla til sølu

Kann brúkast til handil, skrivstovur, verkstað o.a.

Fígging kann evt. útvegast.

**Tel. 21 73 00 · lp@ognir.fo**



## Sunnudagsskúli í Hoyvík

Hvønn sunnudag klokkan 11 er sunnudagsskúli í Hoyvíkar kirkju.

Tú ert eisini vælkomin at verða við.

**Vegna sunnudagsskúlan í Hoyvíkar kirkju**

**Snorri Brend (fartlf. 598599)**